## Viðganga sosiala dumping

Meiri enn helmingurin av vinnulívsleiðarunum í Norðurnoregi ásanna, at teir medvirka til sosiala dumping við at innflyta útlendska arbeiðsmegi, sum fær minni í løn enn teirra norsku starvsfelagar. Summir vinnulívsleiðarar siga, at teir fremmandu hava sjálvir skyldina av, at teir fáa minni løn enn norðmenn, og nakrir hava hug at geva myndugleikunum skyldina. Eftirspurningurin eftir útlendskari arbeiðsmegi í Noregi er stórur.




# Fá hugskot

**- Vit vilja fegin stuðla virksemi á útoyggj. Trupulleikin er bert hann, at vit fáa sera fáar umsóknir hagani, sigur Bjarni Olsen, stjóri í Eik. Á ráðstevnu hjá Útoyggjafelagnum herfyri greiddi hann frá møguleikum og treytum hjá bankanum at veita fígging til útoyggjar**

OYGGJAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Útoyggj:** - Fyri okkum er eingin ivi um, at lata vit lán til eina verkætlan, so skal hon vera lønandi.

- Okkara endamál er stutt sagt at fáa lánið aftur, sigur Bjarni Olsen.

Beint undan innleggi hansara var íverksetarin, Niklas Heri Jákupsson komin við fleiri hugskotum um vinnuligt virksemi á bygd.

Eftir hann kom stjórin í Eik Banka, og hann vísti á, at trupulleikin mangastaðni er, at tað eru so fáar verkætlanir her sum eru lønandi.

- Framleiðslan á útoyggj er ofta kostnaðarmikil, og tí er størri vandi fyri at tær ganga verri har enn aðrastaðni. Alt má verða rikið á fíggjarligum grundarlagi.

- Tað er sama treyt, ið vit sum banki liva undir. Gjørdu vit ikki tað, skuldu vit at enda havt stuðul til okkara virksemi, sigur hann.

### Skal geva avkast

Ein peningastovnur sum Eik hevur møguleika at veita fólki nógvar ymiskar tænastur, bæði tá talan er um uppsparingar, ráðgeving og sjálvandi útlán til privatfólk og sum vinnulán.

Bankin er sum vera man áhugaður í at veita lán til virksemi kring alt landið. Men gongdin seinastu árini vísir tó, at ein rættiliga lítil partur er endaður á útoyggj.

Í fjør veitti Eik bara ein fjórðings prosent í vinnulánum til útoyggj, samstundis sum tey beinleiðis innlánini vóru undir eitt prosent.


*Neyðugt er at finna ein leist eftir hvørjum ein kann finna fram til tær góðu verkætlanirnar sum fólk á útoyggj sita við. Her kundi ein fastur arbeiðsbólkur ráðgivið teimum sum vita við hesum hugskotunum. Her í Mikladali er ætlanir um at gera ein sannan frítíðardepil*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Spurningurin er, hvørt hetta er nógv ella lítið í mun til talið av fólki, sum býr á hesum støðum.

Fyri Eik er kortini eingin ivi um, at hesi fólkini eisini eru fevnd av teirra visjón um at vera øllum kundum at gagni við at veita teimum fíggjarligar tænastur.

- Einasta treyt, sum vit seta, er at tað skal geva avkast, sigur Bjarni Olsen.

Tøkniliga er einki til hindurs fyri, at bankin kann veita eina tænastu til útoyggj og onnur, og at óneyðugt er við Eik-deildum á hvørjum tanga.

### Vera verulig

Spurningurin hjá Bjarna til útoyggjafólkið er tí hesin: - Hví er so lítið virksemi á útoyggj?

Hjá Eik eru høvuðstreytirnar fyri at veita lán til vinnuligt virksemi, at verkætlanin skal vera lønandi, soleiðis at bankin kann fáa lánið aftur.

Ein verkætlan skal harafturat vera veruleikakend, men her vísir tað seg ofta at trupulleikarnir stinga seg upp: Munurin á tí, sum bankin metir vera veruleikakent, og á tí sum stigtakararnir meta.

- Vit hava okkara krøv, og sum vit mugu uppfylla. Okkara endamál er jú at vágin hjá okkum skal kunna avmarkast.

- Tess størri vágin er, tess størri er kravið til trygdina, sigur Bjarni Olsen, og vísir til, at fáar verkætlanir á útoyggj kasta fíggjarliga av sær.

Høvuðsorsøkin til hetta er, at marknaðurin tykist vera veikari enn á øðrum støðum, og at framleiðslan er munandi dýrari. Tí eru størri sannlíkindi fyri, at tað verður truplari at fáa slíkt virksemi at bera seg á útoyggj.

Skal bankin tryggja seg í slíkum førum er neyðugt, at størri krøv verða sett til trygd, við til dømis hægri eginpeningi ella at ognir verða settar í veð.

### Lægri virði

Bjarni Olsen vísir á, at júst hetta við trygdini er ein trupulleiki mangastaðni.

Tað vísir seg nevniliga, at sethús og fastar ognir hava ofta lægri virði enn aðrastaðni. Hetta ger seg serliga galdandi, um tað gerst neyðugt at selja tey aftur.

Fólk á útoyggj eru sjálvandi tey, sum eru truplast fyri í hesum máli, men tað eru eisini onnur øki, sum eru munandi nærri meginøkinum, ið virka undir somu korum.

Dømi um hetta eru Sandoyggin, sunnara helvt av Suðuroynni, norðari parturin av Eysturoy, Viðoy og norðari partur av Borðoynni, har trupult er at fáa lønandi virksemi.

- Men lat meg beinanvegin sláa fast, at hetta ikki er eindømi fyri Føroyar. Peningastovnar í Danmark arbeiða

## Trupult at fáa fígging

Sum ein virkin peningastovnur er Eik sjálvandi hugaður í at veita lán til vinnuligt virksemi á meginøkinum, eins væl og á útoyggj.

Trupulleikin er bert hann, at tað koma sera fá hugskot og fyrispurningar úr útoyggj um vinnuligt virksemi.

- Tá tey so endiliga koma, vísir tað seg tíverri alt ov ofta, at tey í fyrsta lagi eru ov veik, og í øðrum lagi fíggjarliga ivasom.

- Tí er tað so trupult hjá teimum at fáa fígging, vísir Bjarni á.

Hinvegin heitti hann á fólk á útoyggj um at koma til bankan við sínum góðu hugskotum. Tey eru altíð fús at koma við ráðgeving og vegleiðing.

Stjórin í Eik vísti á, at nógvir møguleikar eru fyri vinnuligum virksemi á útoyggj, millum annað innan ferðavinnuna. Alt hetta er við til at tryggja fjølbroytni í livimøguleikunum her á landi.

Neyðugt er at seta eitt miðvíst arbeiði í gongd at finna fram til allar tær góðu verkætlanirnar, sum fólk á útoyggj sita við.

Hansara uppskot var at seta ein fastan arbeiðsbólk at taka sær av hesum. Her kundu umboð fyri útoyggjar, vinnuna og tað almenna ráðgivið teimum sum koma við hugskotunum.